Álit

í

løgtingsmáli nr. 25/2020: Uppskot til løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 og 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, hevur lagt málið fram 22. september 2020, og eftir 1. viðgerð 24. september 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 29. september og 8. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Sinnisbata, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og við landsstýrismannin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, saman við umboðum fyri sjúkrahúsverkið.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sent nevndini skriv, har hann boðar frá, at hansara ynski er, at løgtingslógaruppskotið skal verða galdandi í 3 ár frá lógarinnar gildiskomu. Trivnaðarnevndin tekur undir við hesum og setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 3, verður “31. desember 2022” broytt til: “31. oktober 2023”.

Viðmerkingar:
Við hesi broyting verður royndarskipanin galdandi í trý heil ár.

Við hesi broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 20. oktober 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen